# Havnar Bio

UMMÆLI:



Filmurin sýnir, hvussu seinastu vikurnar hjá Adolf Hitler vóru, og er tað steno-grafurin, Traudi Junges, sum greiðir frá hesum.

Tað stendur greitt, at Týskland hevur tapt kríggið. Landið er í upploysn, og sama kann sigast um triðja ríkið, sum ætlanin var at byggja upp. Hitler hevur saman við sínum nærmastu - teirra millum Eva Braun og Goebbels húskinum - byrgt seg inni í førarabunkaranum mitt í Berlin, har lagnan bíðar teimum. Teir sameindu nærkast alt meira sjálvum Berlin, og í samsvari við krígsgongdina, verður sálarliga støðan hjá føraranum alt meira óstøðug. Skjótt teknar seg ein mynd av einum Hitler, sum er í ferð við at missa seinasta pettið av tamarhaldi á sær sjálvum. Hann ivast ikki í, at nógvar ráða-gerðir eru framdar móti sær, og jødahatur hansara verður sterkari fyri hvønn dag. Men samstundis sæst eisini ein Hitler, ið avdúkar fleiri menninskjansligar síður, sum ikki hava verið sæddar fyrr.

Filmurin hevur longu fingið framúr góð ummæli. Fleiri danskir ummælarar hava givið honum seks stjørnur av seks møguligum, og orð sum stórsligin, eina-standandi, meistaraverk og skelkandi hava verið tengd at ummælinum.

TÍÐIRNAR:

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu




## Sidste nat på station 13 — *FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 24.06 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 25.06 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 26.06 | kl. 20.15 | kl. 22.45 |




## Der Untergang — *FRUMSÝNING*

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 24.06 | kl. 20.00 |
| Leygardag | 25.06 | kl. 20.00 |
| Sunnudag | 26.06 | kl. 19.30 |




## War of the Worlds — *HEIMSFRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 29.06 | kl. 20.00 | kl. 22.30 |